# Næmingaráð: Demokratiskur leikvøllur ella symbolsk skipan?

fróðskapur
Fróðskaparrit 72 (2026): 94-109
©The Author(s) 2026 Open Access under Creative Commons by Attribution License. Use, distribution and reproduction are unrestricted. Authors and original publication must be credited.
www.frodskapur.fo/

## Student Councils: Democratic Arena or Symbolic Structure

**Frida Poulsen[1], Helena Kannuberg[2]**

### Abstract

Democratic participation of children and young people has gained increasing importance in Nordic and Faroese educational policy. In 2025, the Faroese government enacted a regulation on student councils in public schools, which is a step further guaranteeing all students the right to representation and participation. However, Nordic research indicates that although student councils are intended to foster democratic citizenship, students' actual influence remains limited. This article builds on a Nordic comparative study, including data from the Faroe Islands, and situates the Faroese case within a wider Nordic framework. The analysis draws on Lundy's model of meaningful participation—space, voice, audience, and influence—and on Biesta's notion of citizenship as *being* rather than *becoming*. The article examines the Faroese legislative and educational context, identifies key participation challenges, and discusses whether student councils can serve as arenas for genuine democratic learning or risk becoming symbolic mechanisms fulfilling policy rhetoric without real impact.

### Úrtak

Demokratisk luttøka hjá børnum og ungum hevur seinastu árini fingið vaksandi fokus í føroyska og norðurlendska skúlapolitiska kjakinum. Í 2025 varð kunngerð sett í gildi um næmingaráð í føroyska fólkaskúlanum, sum er enn eitt fet á leiðini at tryggja øllum næmingum rætt til luttøku og umboðan. Samstundis

[1] Námsvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya, t-postur: fridap@setur.fo
[2] Námsvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya, t-postur: helenak@setur.fo

vísa granskingarúrslit úr norðurlendskum høpi, at hóast næmingaráðini eru ætlað at fremja demokratiska luttøku, er ávirkanin hjá næmingunum í verki ofta lítil. Henda grein byggir á norðurlendska kanning, sum Føroyar hava tikið lut í, og samanber føroysk viðurskifti við onnur Norðurlond. Ástøðiliga tekur greinin støði í Lundy-myndlinum um innihaldsríka luttøku (rúmd, rødd, áhoyrari og ávirkan) og í hugsanum hjá Gert Biesta um borgaraskap sum eitt ítøkiligt námsfrøðiligt arbeiði i skúlanum heldur enn sum fyrireiking til framtíðina. Greinin lýsir føroyska lógargrundarlagið, metingar av støðuni hjá næmingaráðum í Føroyum og varpar ljós á spurningin, um næmingaráð kunnu gerast verulig lærirúm fyri fólkaræðisligari luttøku ella eru í vanda fyri at verða symbolsk skipan uttan veruligan týdning.

**Keywords:** Student councils, Democratic education, Participation, Citizenship, Faroe Islands as case, Nordic region.

**Lyklaorð:** Næmingaráð, demokratisk albúgving, luttøka**,** norðurlendsk fyrimynd, Føroyar sum dømi.

## Inngangur

Demokratisk luttøka er eitt grundprinsipp í norðurlendskum útbúgvingarpolitikki. Hetta kemur til sjóndar bæði í barnarættindasáttmálanum hjá ST (1989), sum Føroyar gjørdust partur av í 1992, og í visjónini hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum, um at Norðurlond skulu vera besta stað í heiminum hjá børnum og ungum at liva og mennast (Nordisk Ministerråd, 2020).

Eitt av teimum mest týðandi átøkunum í hesum arbeiði er næmingaráðið – eitt formelt forum, har næmingar kunnu savnast og geva sína meining til kennar um skúlaumhvørvið. Næmingaráðini eru ment sum pallur fyri demokratiskari menning, har børn læra at virka sum virknir luttakarar í einum felagsskapi.

Tó vísir nýggj gransking úr øllum Norðurlondum (Guðjohnsen & Harðardóttir, 2025), at tað er misjavnt, hvussu nógva ávirkan næmingaráðini í verki geva næmingum. Í summum førum virka tey sum verulig lærirúm fyri fólkaræðisligan borgaraskap, men í øðrum førum eru tey mest ein formell skipan, har næmingarnir hava lítlan møguleika at ávirka veruligar avgerðir.

Lógin um næmingaráð í fólkaskúlalógini frá 1997 (sí grein 56 stk. 3) fyriskrivar, at reglur skulu gerast, men tær vórðu ikki gjørdar fyrrenn í 2025 við nýggju kunngerðini um næmingaráð í fólkaskúlanum (Kunngerð nr. 119 frá 02.07.2025). Sostatt hevur føroyska skúlaverkið nú lógarfestar reglur fyri næmingaráð og landsráð fyri næmingaráðini. Nýggju reglurnar geva ein gyltan møguleika at kanna, hvussu næmingaluttøka verður skipað og upplivað í føroyska fólkaskúlanum. Endamálið við greinini er ikki at gera eina beinleiðis endurskoðan av næmingaráðunum, men heldur at fáa eina betri fatan av teimum mekanismum og fortreytum, sum hava týdning fyri demokratiska luttøku í skúlanum. Við støði í føroyska partinum í norðurlendsku kanningini viðger greinin, í hvønn mun næmingaráð virka sum demokratisk lærirúm, har

næmingar fáa møguleika at luttaka, verða hoyrdir og hava ávirkan á skúlalívið, ella um talan í størri mun er um eina symbolska skipan, sum lýkur formligu lógarkrøvini uttan at skapa veruliga demokratiska luttøku.

Greinin setur sostatt føroyska lóggávu, politisku ætlanirnar og praksis undir luppin við teimum ástøðiligu brillunum, sum Lundy (2007) og Biesta bjóða fyri at varpa ljós á bæði møguleikar og avbjóðingar í arbeiðinum við næmingaráðum í føroyskum skúlaumhvørvi. Samstundis verður dentur lagdur á føroyska samfelagsliga og mentanarliga samanhangin, sum næmingaluttøkan virkar innanfyri. Føroysk gransking um ung og samfelag vísir, at føroyskt ungdómslív er merkt av tøttum sosialum relatiónum og sterkum lokalsamfelagsbondum, har samleiki og luttøka ofta verða skapt í smáum og nærum felagsskapum (Gaini, 2013). Hetta hevur týdning fyri skúlan sum demokratiskan pall, tí næmingaluttøka ikki bert verður skapað gjøgnum formellar skipanir, men eisini gjøgnum tær mentanir, relatiónir og valdskipanir, sum eyðkenna gerandisdagin í skúlanum.

## Ástøðiligur karmur

Í hesi grein verða serliga ástøðini hjá Lauru Lundy (2007) og Gert Biesta (2006) nýtt sum ástøðiligur karmur til at skilja næmingaluttøku og demokratiska læring í skúlahøpi. Hesi eru vald, tí tey umboða tvær viðkomandi og hvørt sítt sjónarhorn á luttøku og fólkaræði í útbúgving: eitt barnarættindaligt og eitt námsfrøðiligt-demokratiskt.

Í hesi grein verður demokrati skilt sum meira enn ein formell skipan við reglum og umboðan. Við støði í Biesta (2006) verður demokrati fatað sum livað og sosial praksis, har børn og ung læra fólkaræðið við at taka lut í veruligum felagsskapum, har teirra rødd verður hoyrd og hevur týdning. Hetta merkir, at demokrati í skúlahøpi ikki bert snýr seg um at læra um fólkaræði, men eisini um at fáa møguleika at útinna og uppliva fólkaræði í gerandisdegnum.

Samstundis byggir greinin á eina barna- og ungdómsfatan, har næmingar verða fataðir sum virknir samfelagsborgarar heldur enn passivir móttakarar av undirvísing og avgerðum hjá vaksnum. Hendan fatanin samsvarar við bæði barnarættindasáttmálan hjá Sameindu Tjóðum og norðurlendska gransking um næmingaluttøku (Rönnlund, 2014; Andersson, 2018; Tujula, 2023), ið leggur dent á rættin hjá børnum at verða hoyrd og hava ávirkan á viðurskifti, sum viðvíkja teimum sjálvum (Lundy, 2007). Við hesum útgangsstøði verða næmingaráð í greinini ikki bara fatað sum organisatoriskar skipanir, men sum møguligir demokratiskir læripallar, har næmingar kunnu menna ábyrgd, samstarv og borgaraligu luttøku.

Luttøka og borgaraskapur eru ikki statisk hugtøk, men verða skapað gjøgnum sosialar og mentanarligar tilgongdir. Laura Lundy (2007, 2013), ið er professari í barnarættindum við Queen's University í Belfast, hevur ment ein myndil fyri innihaldsríka luttøku, sum m.a. byggir á grein 12 í Barnarættindasáttmálanum.

Lundy-myndilin verður nógv brúktur í gransking um børn, útbúgving og luttøku, tí hann ger tað møguligt at greina luttøku sum meira enn bert rættin at siga sína meining. Í hesi grein verður Lundy-myndilin valdur sum ástøðiligur karmur, tí myndilin gevur eitt hent analytiskt amboð til at kanna, hvørt næmingaráð skapa veruliga demokratiska luttøku, ella um tey einans virka sum formellar skipanir. Við at arbeiða við teimum fýra dimensjónunum – rúm, rødd, áhoyrari og ávirkan – ber til at kanna, um næmingar fáa møguleika at luttaka, og í hvønn mun teirra sjónarmið fáa týdning í praksis. Myndilin fevnir um fýra øki, ið skulu vera lokin, um talan kann vera um meiningsfulla luttøku, sí myndil niðanfyri:




Mynd 1: Lundy-myndilin tekur støði í grein 12 í barnarættindasáttmálanum um rættindini at úttrykkja seg og rættindi at hava sjónarmið og geva teimum ans. Myndin vísir, at økini ávirkan, áhoyrari, rúm og rødd eru avgerandi fyri innihaldsríka luttøku.

Fyri at hava innihaldsríka luttøku er neyðugt, at krøvini viðvíkjandi rúmd, rødd, áhoyrara og ávirkan eru lokin. (1) Rúmd (space) fevnir um rættin hjá børnum at hava trygg og innihaldsrík rúm til luttøku. Í skúlunum eru næmingaráð, har ið avgerðir verða tiknar, eitt slíkt rúm. Øll børn eiga at hava trygga atgongd til slík rúm uttan mun til kyn, førleika, átrúnaðarliga, mentanarliga ella sosiobúskaparliga bakgrund. (2) Rødd (voice) fevnir um møguleikan hjá børnum at siga sína meining. Tað er ábyrgdin hjá vaksnum at tryggja, at hetta kann fara fram vandaleyst. Í næmingaráðum er neyðugt, at einstaki næmingurin t.d. upplivir, at hann treytaleyst kann nýta sína egnu rødd. (3) Áhoyrari (audience) vísir á, at børn ikki bara hava rætt at bera sínar hugsanir fram, men eisini hava rætt til at vera hoyrd og tikin í álvara. Í skúlunum fevnir hetta um samskifti og samstarv millum næmingar og millum lærarar og leiðslu, sum eisini hava ábyrgd av virkseminum hjá næmingaráðnum í skúlanum. Til endans er (4) ávirkan (influence), sum snýr seg um at tryggja, at sjónarmiðini hjá

næmingunum føra til avgerðir og broytingar. Lærarar og leiðsla skulu vera fús at lurta eftir næmingunum, geva teimum afturboðan og greiða frá, hvussu teirra sjónarmið eru viðgjørd í málum, sum ávirka næmingarnar.

Í hesum kørmum, sum Lundy-myndilin setur fram, verður luttøka ikki bara eitt mál í sjálvum sær, men ein lærandi tilgongd, sum krevur bæði mentanarligt tilvit og skipanarligar karmar. Hollendski professarin í útbúgvingarheimspeki Gert Biesta (2006) leggur í lýsing síni av demokratiskari læring dent á, at skúlin ikki eigur at síggja næmingarnar sum framtíðarborgarar, men sum borgarar nú og her. Hetta merkir, at skúlin ikki bara skal fyrireika næmingarnar til at taka lut í einum framtíðar samfelagi, men sjálvur er eitt stað, har fólkaræðið verður livað, roynt og gjørt veruligt í gerandisdegnum.

Biesta (2006) vendir sær ímóti eini námsfrøðiligari hugsan, sum hann kallar "education for citizenship", har undirvísingin verður eitt tól til at fremja ávísar fatanir, dygdir ella sosialar førleikar, sum kunnu brúkast seinni í lívinum. Í staðin setir hann fram hugtakið "demokratisk læring sum livandi praksis", har næmingarnir í sjálvum skúla-samfelagnum fáa møguleika at venja seg at taka støðu, lut og ábyrgd í veruligum og týðandi samanhangum.

Biesta peikar á, at fólkaræðið ikki kann lærast sum eitt ástøðiligt evni, men má upplivast og skapast í samskifti við onnur – gjøgnum tað, sum hann nevnir "subjectification": tann persónliga tilverugeringin, har menniskjað gerst eitt subjekt, sum kann taka støðu og handla. Í hesum ljósi verður næmingaráðið ein týdningarmikil partur av skúlanum sum eitt demokratisk lærirúm. Her sleppa næmingar at virka sum borgarar – ikki í ástøðiligari fyrireiking, men í veruligum praksis, har teir royna at hava ávirkan, samráðast við starvsfólk og leiðslu, og taka lut í avgerðum, sum hava týdning fyri skúlalívið.

Soleiðis kann greiningin hjá Biesta lýsast sum ein etiskur og politiskur boðskapur til skúlarnar: Læringin eigur ikki at stýra móti einum ávísum útfalli (t.d. "góðum" framtíðarborgarum), men eigur at skapa pláss fyri óvissu, ósemju og samrøðu, sum eru kjarnin í einum livandi fólkaræði. Næmingaluttøka og næmingaráð geva júst hetta rúmið – eitt stað, har næmingarnir kunnu royna at verða hoyrdir og taka ábyrgd sum samtíðar borgarar. Sum Biesta (2013) argumenterar fyri, eigur demokrati ikki bert at verða fatað sum nakað, ið skúlin fyrireikar næmingar til, men sum nakað, ið eigur at verða livað og útint í sjálvum skúlaumhvørvinum.

### *Luttøka sum livandi fólkaræði*

Tá ástøðið hjá Biesta verður sett í samband við Lundy-myndilin (2007) – rúmd, rødd, áhoyrari og ávirkan – gerst týðiligt, at bæði leggja dent á, at næmingar skulu hava veruligan møguleika at luttaka sum borgarar her og nú. Men meðan Lundy leggur dent á tey skipanarligu og rættarligu elementini í næmingaluttøku, leggur Biesta dent á námsfrøðiligu og eksistentiellu dimensjónina við áherðslu á, at skúlin sum lærifelagsskapur má skapa rúm og

hugburð til, at næmingar veruliga fáa møguleika at vera til staðar sum subjekt, og ikki bara sum móttakarar av læring ella politikkum.

Føroysku dáturnar (sí brotið *Úrslit og greining*) vísa, at tað ofta eru avmarkingar í júst hesum spenninum: Næmingaráð eru formelt sett á stovn (space), og næmingar fáa høvi at siga sína meining (voice), men teirra rødd verður ikki altíð tikin í álvara (audience), og ávirkanin á avgerðir (influence) er avmarkað. Her kann Biesta hjálpa okkum at tulka, hví hetta ikki bara er ein skipanarlig avbjóðing, men eisini ein námsfrøðilig.

Skúlin kann hava tólini og reglurnar fyri luttøku, men um hugburðurin og menningarsjónarmiðið framvegis byggir á, at næmingar skulu *læra at vera borgarar í framtíðini*, verður sjálvt eitt vælskipað næmingaráð bert ein venjingarvøllur heldur enn ein veruligur demokratiskur pallur. Tað, Biesta minnir okkum á, er, at fólkaræðið má livast – eisini í teimum smáu samrøðunum, avgerðunum og mótstøðunum, sum mynda gerandisdagin í skúlanum. Í hesum ljósi verður næmingaráðið ikki bara eitt skipanarligt og námsfrøðiligt hjálparamboð, men eitt etiskt og politiskt stað: Eitt stað har næmingar og starvsfólk saman skapa demokratiskt tilvit. At arbeiða við næmingaráðum merkir tí eisini at viðgera, hvørjar mentanarligar og etiskar fortreytir eru fyri, at børn og ung kunnu kenna seg viðurkend sum veruligir luttakarar. Her er týdningarmikið, at næmingar ikki einans fáa høvi til at tosa, men eisini verða hoyrd og uppliva, at teirra rødd gera mun.

Gransking úr Norðurlondum (Tujula, 2023; Tiusanen, 2025; Guðjohnsen & Harðardóttir, 2025) vísir, at hóast næmingaráð í nógv størri mun eru lógarfest og politiskt lýst sum týðandi demokratisk amboð, eru framvegis fleiri grundleggjandi avbjóðingar knýttar til, hvussu næmingaluttøka verður framd í praksis.

Fyri tað fyrsta er ein afturvendandi avbjóðing ójøvn atgongd hjá ymiskum næmingabólkum. Tað eru ofta eldri, málsliga sterkir og sosialt tryggir næmingar, sum taka mest lut í næmingaráðum, meðan yngri næmingar, næmingar við serligum tørvi ella næmingar við aðrari mentanarligari og málsligari bakgrund hava ilt við at gera sína rødd og ávirkan galdandi. Hetta merkir, at næmingaráð kunnu endurskapa verandi valdskipanir heldur enn at virka sum eitt inkluderandi demokratisk rúm.

Fyri tað næsta vísir granskingin somuleiðis, at leikluturin hjá vaksnum ofta er ógreiður. Lærarar og leiðsla hava stóran týdning fyri, um næmingaráð fáa møguleika at virka sjálvstøðugt og við meining, men samstundis kann ov nógv stýring frá vaksnum avmarka sjálvsavgerðarrættin og initiativið hjá næmingunum. Manglandi vegleiðing og greiðir karmar kunnu gera, at næmingaráð missa týdning ella gerast ósjónlig í gerandisdegnum í skúlanum.

Ein triðja avbjóðing er, at næmingar ofta uppliva avmarkaða ávirkan á veruligar avgerðir. Hóast teir fáa møguleika at koma til orðanna, eru tað ikki altíð skipanir, sum tryggja, at sjónarmiðini verða tikin við í avgerðartilgongdum. Luttøkan verður sostatt ofta ráðgevandi heldur enn avgerandi, og fleiri

næmingar uppliva, at teir verða hoyrdir uttan veruliga at fáa ávirkan. Haraftrat vísir norðurlendska granskingin, at arbeiðið hjá næmingaráðum ofta savnar seg um sosial tiltøk, trivnaðartiltøk og praktisk viðurskifti heldur enn grundleggjandi spurningar um læring, undirvísing og skúlapolitikk. Hetta kann gera, at næmingaráð verða fatað sum eitt sosialt ískoyti heldur enn ein demokratiskur pallur fyri borgaraliga luttøku og kritiska samrøðu.

Samanlagt benda hesi viðurskifti á, at demokratisk luttøka ikki kann tryggjast við lóggávu og formellum skipanum einsamøllum. Skal næmingaluttøka gerast verulig og innihaldsrík, krevst eisini ein mentanarlig og námsfrøðilig tilgongd, har skúlin aktivt arbeiðir við at skapa rúm fyri samrøðu, ávirkan og felags ábyrgd.

## Háttalag

Kanningin hevði fleirfalt háttalag (Braun & Clarke, 2013), har kvantitativar og kvalitativar dátur vórðu savnaðar. Endamálið var at fáa eitt yvirskipað innlit í skipanir og luttøku í næmingaráðum og eina djúpari fatan av, hvussu næmingar uppliva demokratiska luttøku í gerandisdegnum í skúlanum.

Í fyrsta lagi varð galdandi lóggáva og reglur um næmingaráð í teimum luttakandi londunum kortløgd. Í føroyskum høpi fevndi hetta um fólkaskúlalógina og nýggju kunngerðina um næmingaráð frá 2025, umframt tilfarið frá kanningum hjá Barnaumboðsmanninum (2024).

Í øðrum lagi varð ein spurnakanning gjørd millum næmingar í 5. flokki og 9./10. flokki, alt eftir, hvat hægsta floksstig í einstøku londunum er. Spurnakanningin varð umsett til føroyskt og varð svarað talgilt í skúlatíðini. Næmingarnir svaraðu hvør sær og anonymt. Spurningarnir snúðu seg m.a. um, hvørt næmingarnir vistu um næmingaráðið, hvussu teir upplivdu at taka lut og ávirka, og í hvønn mun teir hildu, at teirra sjónarmið vórðu tikin í álvara í skúlanum. Spurnakanningin var svarað á netinum (Qualtrics) og fevndi um opnar og lokaðar spurningar um vitan, royndir og luttøku í næmingaráðum. Tilsamans svaraðu 2.205 næmingar spurnakanningini býtt yvir hesi lond: Í Danmark svaraðu 278 næmingar, í Finnland 303 næmingar, í Føroyum 638 næmingar, í Grønland 23 næmingar, í Ísland 917 næmingar, í Noregi 8 næmingar og í Svøríki 69 næmingar.

Sum sæst høvdu Føroyar og Ísland ta størstu luttøkufjøldina av øllum londunum, og føroyska úrtøkan er sostatt ein av teimum best umboðandi partunum í heildargrundarlagnum. Hetta gevur serliga góðan møguleika at varpa ljós á, hvussu næmingaluttøka verður fatað í einum lítlum samfelagi, har sannlíkindini eru størri fyri tættari sambandi millum næmingar, lærarar og skúlaleiðslu.

Dátugreiningin er gjørd við støði í lýsandi háttalagi fyri lokaðu spurningarnar og tematiskum háttarlagi fyri teir opnu (Braun & Clarke, 2022). Tó var ikki møguligt at gera sjálvstøðugar greiningar av spunakanningunum í Noregi og

Grønlandi vegna lítla talið av svarum, men hesi lond vóru tikin við í kvalitativu tematisku greiningina.

Umframt spurnakanningar o.t. vóru verkstovur og fundir við børnum og ungum hildnir í sambandi við norðurlendsk samstarv, har luttakararnir umrøddu demokrati, trivnað og næmingaluttøku.

Føroyski parturin fevnir harumframt um bólkasamrøðu við limir í næmingaráði, har dentur varð lagdur á teirra upplivingar av møguleikum og avmarkingum í arbeiðinum hjá næmingaráðnum.

Etisku viðurskiftini í kanningini vóru grundað á sjálvboðið samtykki, trúnað og rættin hjá næmingunum at velja, hvat teir vildu deila. Dentur varð lagdur á at skapa tryggar karmar, soleiðis at næmingarnir kundu tosa frítt um sínar royndir og sjónarmið.

Samansetingin av kvantitativum og kvalitativum dátum gjørdi tað møguligt at kanna bæði tær skipanarligu og tær upplivdu dimensjónirnar av næmingaluttøku. Meðan lóggáva og spurnakanningar góvu eitt samanbæriligt yvirlit tvørtur um Norðurlondini, góvu samrøður og opnu svarini nærri innlit í, hvussu demokrati og luttøka verða livað í praksis í skúlanum.

## Úrslit og greining

### *Politisk kortlegging*

Sum partur av kanningini vórðu lógartekstir, kunngerðir og námsætlanir, ið viðkoma næmingaluttøku og næmingaráðum í teimum sjey luttakandi londunum, kortløgd. Greiningin tók støði í Lundy-myndlinum og fokuseraði serliga á trý øki: 1) rættin og atgongdina hjá næmingum at luttaka, 2) leiklut og ábyrgd hjá næmingaráðum og 3) skipan og arbeiðshættir í praksis.

Kortleggingin vísir, at øll londini í stóran mun fata næmingaráð sum ein týðandi part av arbeiðinum við demokrati og næmingaluttøku í skúlanum. Í flestum londunum eru næmingaráð lógarfest frá umleið 5. flokki og upp. Danmark og Finnland hava ítøkiligar kunngerðir og vegleiðingar, sum lýsa endamál, ábyrgd og arbeiðsgongdir hjá ráðunum. Ísland og Noreg leggja størri dent á trivnað, felags áhugamál og vælferð, meðan Grønland hevur fleksiblari skipan, har allir næmingar í skúlanum kunnu virka sum næmingaráð í smáum skúlum.

Kortleggingin vísir samstundis, at tað er munur á, hvussu næmingaráð eru skipað og hvørja ávirkan tey hava í teimum ymisku londunum. Felags fyri londini er, at næmingaráðini skulu umboða næmingarnar og geva teimum møguleika at luttaka í viðgerðini av málum, sum hava týdning fyri skúlalívið. Arbeiðið fevnir vanliga um trivnað, læruumhvørvi, sosial tiltøk, skúlamentan og onnur viðurskifti, sum hava týdning fyri gerandisdagin hjá næmingunum. Samstundis vísir kortleggingin, at endaligi avgerðarmyndugleikin í flestu førum liggur hjá skúlaleiðslu, skúlastýri, kommunum ella øðrum myndugleikum. Næmingaráðini

hava sostatt rætt til at koma við sjónarmiðum, uppskotum og tilmælum og kunnu á tann hátt ávirka avgerðir, men sjáldan heimild at taka bindandi avgerðir.

Føroyska kortleggingin vísti eina serstøðu. Hóast rætturin til næmingaráð hevur verið lógarfestur síðani 1997, komu ítøkilig reglur um skipan, arbeiðshættir og ábyrgd hjá næmingaráðum ikki fyrrenn við kunngerðina frá 2025. Samanborið við onnur Norðurlond hevur føroyska skipanin í størri mun lagt ábyrgdina á einstøku skúlarnar sjálvar at menna arbeiðshættir og praksis kring næmingaráðini. Hetta ger føroyska tilfarið serliga áhugavert, tí tað gevur møguleika at kanna, hvussu næmingaluttøka verður skapað og livað í praksis í einum skúlaskipanarligum høpi við avmarkaðari formalisering.

Kortleggingin vísir, at tað er munur á, hvussu nógv næmingaluttøka verður stýrd gjøgnum formellar reglur í teimum ymisku londunum. Samstundis vísa úrslitini, at demokratisk læring og upplivingin av ávirkan ikki einans eru treytað av lógarverki, men eisini av tí praksis og teimum relatiónum, sum verða ment í gerandisdegnum í skúlunum.

### *Spurnakanningin*

Spurnakanningin umfataði tilsamans 2.205 næmingar úr Danmark, Finnlandi, Føroyum, Grønlandi, Íslandi, Noregi og Svøríki, harav 638 vóru úr Føroyum. Føroyska svarluttøkan var sostatt tann størsta í norðurlendsku kanningini, burtursæð frá Íslandi, og gevur eitt áhugavert innlit í, hvussu føroyskir næmingar uppliva næmingaráð og demokratiska luttøku í skúlanum.

Úrslitini vísa fyrst og fremst, at næmingaráð eru ein sjónligur og væl kendur partur av føroyska skúlanum. Heili 96 % av føroysku næmingunum søgdu, at næmingaráð vóru á teirra skúla, sum er á sama støði sum í Danmark og hægri enn í øðrum Norðurlondum. Eisini vísti kanningin, at føroyskir næmingar í stóran mun kenna til skipanina um næmingaráð. Tríggir fjórðingar av næmingunum søgdu seg duga at greiða frá, hvussu val til næmingaráðið fer fram, og tað er eitt av bestu úrslitunum í kanningini. Hetta bendir á, at næmingaráð eru væl integrerað sum formell skipan í føroyska skúlanum. Kortini vísa svarini eisini, at munur er á at kenna skipanina og at uppliva veruliga ávirkan. Bert helmingurin av føroysku næmingunum metti, at lærarar og leiðsla tóku næmingaráðini í álvara. Hetta bendir á, at hóast næmingar fáa møguleika at luttaka, er tað ikki altíð greitt fyri teimum, hvønn týdning teirra luttøka hevur í veruligum avgerðartilgongdum.

Í øllum londunum vísa úrslitini, at næmingaráðini ofta arbeiða við praktiskum og sosialum málum, eitt nú tiltøkum, innsavningum, trivnaði, umhvørvi og skúlahølum. Føroyskir næmingar nevna serliga batar í skúlahølum, uttandura økjum og trivnaði. Hetta vísir, at næmingaráðini í praksis ofta virka í gerandisdegnum hjá næmingunum, men eisini at tey í minni mun tykjast arbeiða við djúpari spurningum um læring, undirvísing og skúlapolitiskar avgerðir.

Valhættirnir eru í høvuðsheitum skipaðir eftir demokratiskum meginreglum við sjálvuppstilling, framløgum og dulnevndum atkvøðugreiðslum. Kortini vísa

fleiri næmingar – eisini í Føroyum – á avbjóðingar í sjálvari valtilgongdini. Serliga verður nevnt, at popularitetur kann hava ov stóran týdning, at reglurnar kunnu vera ógreiðar, og valini ikki altíð verða upplivað sum rættvís. Hetta vísir, at eisini formelt demokratiskar skipanir krevja greiðar karmar og vegleiðing, um tær skulu upplivast sum rættvísar og inkluderandi.

Ein afturvendandi avbjóðing í øllum londunum er spurningurin um at verða hoyrdur og at hava ávirkan. Flestu næmingar uppliva, at teir í ávísan mun verða hoyrdir, serliga av lærarum, men minni av leiðslu. Í føroyska tilfarinum sæst sama mynstur: Næmingarnir uppliva luttøku, men eftirlýsa størri opinleika og greiðari afturboðanir um, hvat verður gjørt við teirra uppskot. Hetta vísir á vandan fyri, at næmingaráð gerast ein symbolsk skipan heldur enn ein demokratiskur leikvøllur. Hóast næmingar sleppa til orðanna og seta mál á dagsskrá, er tað ikki altíð greitt, hvussu teirra sjónarmið verða viðgjørd, ella um næmingarnir fáa ávirkan.

Samanborið við hini Norðurlondini standa Føroyar lutfalsliga sterkt, tá talan er um kunnleika til næmingaráð, vitan um valhættir og upplivingar av ítøkiligari ávirkan. Samstundis líkjast Føroyar hinum londunum í avbjóðingini, at gjøgnumskygni og afturmelding frá lærarum og leiðslu eru veik. Føroyskir næmingar tykjast sostatt hava gott rúm til luttøku og fleiri dømi um ávirkan, men teir sakna greiðari sambandi millum uppskot, viðgerð og avgerð.

Sæð í størri demokratiskum perspektivi vísa úrslitini sostatt eina tvídrátt. Á aðrari síðuni eru føroysk næmingaráð sjónlig, skipað og væl kend millum næmingar. Á hinari síðuni er framvegis ógreitt, hvussu djúp og meiningsfull ávirkanin hjá næmingunum veruliga er. Hetta samsvarar við norðurlendska gransking (Andersson, 2018; Rönnlund, 2014; Tujula, 2023), sum vísir, at næmingaluttøka ofta hevur sterkar formellar karmar, men at verulig demokratisk ávirkan krevur meira enn skipanir og val. Hon krevur eisini samskifti, afturmelding og eina skúlamentan, har næmingar uppliva seg sum borgarar her og nú.

## Føroysk næmingaluttøka í praksis

Við at brúka Lundy-myndilin (2007, 2013) sum greiningarkarm kunnu vit lýsa føroysku støðuna frá fýra sjónarhornum:

### *Formelt rúm og praksis*

Kunngerðin nr. 119 frá 2. juli 2025 áleggur, at allir næmingar frá 5. flokki hava rætt til næmingaráð, og at ráðini skulu virka í samsvari við galdandi reglur. Hetta er eitt stórt stig framá, tí tað gevur næmingum formligan og lógarfestan rætt til at hava eina rødd.

Tó bendir kanningin hjá Barnaumboðsmanninum (LUM, 2024) á, at tað í verki er stórur munur millum skúlar. Summir hava vælvirkandi næmingaráð, meðan aðrir einans hava ráð á pappírinum. Lærarar og leiðarar eru ofta óvissir

um sín leiklut, og næmingarnir vita ikki altíð, hvat teir hava rætt til. Samrøða við føroyskt næmingaráð staðfestir, at samskifti við lærarar og leiðslu er ógreitt, og at næmingarnir ikki vita, nær næmingaráðsfundir liggja, og tískil hvørki fáa møtt ella fyrireikað seg:

> Altso tað einasta, sum eg havi fingið vita, tað er, at tað er ein mikudag um mánaðin, har ið vit oftast hava møti, men eg veit ikki, hvønn mikudag, og tað er ikki altíð, at vit møtast *(Úr samrøðu við føroyskt næmingaráð, 2025).*

Seinni í samrøðuni kemur ein næmingur inn á nakað tað sama, um at viðkomandi ikki veit, nær fundirnir liggja:

> Vit hava havt ræðuliga fáar fundir, haldi eg, í mun til tað, sum vit burdu (...) vissi vit skulu hava ein fund (...) so sigur skúlastjórin tað til morgunsang, og so eru tað summi av okkum, sum eru í hádeild, sum møta seint tann dagin, sum ikki fáa tað við, og so fær mann ikki ordiliga fyrireikað seg til hendan fundin og sovorðið *(Úr samrøðu við føroyskt næmingaráð, 2025).*

Hetta vísir, at hóast rúmið er skapt formelt, so er rúmið fyri veruligari luttøku ikki altíð til staðar. Skúlar mangla ofta tíðaravseting, stuðul og greiðar mannagongdir. Rúmið verður sostatt eitt „vaksnamannastýrt“ rúm heldur enn eitt sjálvstøðugt næmingarúm.

### *Rødd og luttøka*

Flestu næmingar, sum tóku lut í kanningini, søgdu, at teir kundu siga sína meining, men at tað ikki altíð hevði týdning. Fleiri nevndu eisini, at tað oftast eru teir somu næmingarnir og ávísir næmingar, sum fingu mest av tí, sum Lundy nevnir rødd, meðan yngri næmingar ella tey, ið vóru vóru hildin at hava serligan tørv ella annað frávik, ikki vóru í næmingaráðnum. Hetta kemur m.a. fram í útsøgnini hjá einum limi í næmingaráðnum, sum gongur í hádeild:

> Tað eru tey eldru, sum tosa mest, men sjálvandi eisini tey yngru. Eg lovi eisini teimum at svara og sovorðið, men tað eru mest eg og formaðurin (Úr samrøðu við næmingaráð, 2025).

Útfrá hesi útsøgn kundi bent á, at tað eru tey eldru, sum fáa mest talutíð og luttøku.

Ein næmingaráðslimur úr føroysku samrøðuni orðaði seg soleiðis, tá ið spurt varð, um næmingar, ið líkjast burtur frá meirilutanum, vóru í næmingaráðinum:

> Øll kunnu vera vald, men eg haldi ikki, at tey eru beint nú (*Úr samrøðu við føroyskt næmingaráð, 2025).*

Ein næmingur úr føroysku samrøðuni segði soleiðis:

> Vit sleppa at siga okkara meining, men tað er ofta tey somu, sum tosar. Tað er ringt at vita, um tað hevur nakran týdning *(Úr samrøðu við føroyskt næmingaráð, 2025).*

Hetta samsvarar við altjóða gransking (Guðjohnsen o.fl., 2024; Schulz o.fl., 2023), har tað verður víst á, at næmingar ofta ikki vita, hvussu teir skulu brúka sínar møguleikar til luttøku. Tað krevur fakliga og etiska tilgongd hjá lærarum at skapa tryggleika og javnvág í orðaskiftinum.

### *Áhoyrari og afturboðan*

Tað, at verða hoyrdur, krevur eisini, at onkur vil lurta. Føroysku úrslitini vísa, at næmingar ofta halda, at teirra sjónarmið ikki verða tikin í álvara av leiðslu ella lærarum. Hetta er serliga týðiligt, tá tey koma við ítøkiligum uppskotum, sum snúgva seg um læriumhvørvi, reglur ella trivnaðarpolitikk.

Viðmerkingar úr spurnarkanningini vísa, at fleiri næmingar hava ta uppliving, at tað ikki verður lurtað eftir næmingaráðnum, og at tá ið tað verður lurtað, er tilgongdin frá uppskotið til broyting long. Næmingar siga:

> nei tí onki hendur (*Viðmerking hjá næmingi í spurnarkanningini, 2025*)

> ja men tey gera tað ikki beinaveg (*Viðmerking hjá næmingi í spurnarkanningini, 2025*)

> Onkuntíð, har eru nakrar ferðir tey siga at tey fara broyta okkurt men tað er ikki fyrr enn 3 ár seinni *(Viðmerking hjá næmingi í spurnakanningini, 2025)*

Í summum skúlum er tó hendan áhoyraravíddin sterkari: har næmingaráðið hevur beinleiðis samband við skúlaleiðslu og fær boð aftur um, hvat verður gjørt við teirra mál. Har sýnist eitt *feedback-loop* at vera til staðar — ein grundtreyt fyri trúvirði og læring í luttøkumenning (Biesta, 2006). Nakrir næmingar vísa í spurnakanningini á, at teir uppliva at vera hoyrdir, hóast niðurstøðan ikki altíð er tann, teir ynskja:

> ja tey vilja eisini hjálpa næmingaránum (*Viðmerking hjá næmingi í spurnakanningini, 2025*)

> ja við summum men ofta taka tey bert hugskot ið hava verið uppá tal í fleiri ár *(Viðmerking hjá næmingi í spurnakanningini, 2025)*

### *Møguleikar fyri ávirkan*

Tað er í hesum høpi, at spurningurin um „leikvøll ella symbol" veruliga gerst sjónligur.
Hóast næmingaráðini fáa møguleika at gera tiltøk og koma við uppskotum, so hava tey í verki lítið vald at taka avgerðir. Flestu næmingaráð arbeiða við

sosialum tiltøkum, trivnaðsverkætlanum og skúladegnum, men sjáldan við kjarnuviðurskiftum sum læruumhvørvi, reglum ella trivnaðarpolitikki. Ein næmingur setur orð á júst hetta, tá ið prátið í samrøðuni fer at snúgva seg um gerandisdagin í skúlanum, m.a. nýggja telefonpolitikkin:

> Tað er ikki nakað, sum vit føla, at vit kunnu hava nakra ávirkan á *(Úr samrøðu við føroyskt næmingaráð, 2025).*

Seinni sigur sami næmingur um støðuna við innførda telefonpolitikkinum:

> Mann følir seg eitt sindur settan til síðis, tá ið mann er so nógv yngri *(Úr samrøðu við føroyskt næmingaráð, 2025)*.

Viðmerkingar úr spurnakanningini vísa, at tey dømi um broytingar, ið kunnu rekjast aftur til virksemið hjá næmingaráðnum í flest øllum førum kunnu lýsast sum sosial tiltøk, trivnaðarverkætlanir og skúladagin. Úr rúgvuni kunnu vit nevna, at fleiri næmingar nevna, at teir hava fingið fingið betri sofur, fleiri borðspøl, batt og bóltar. Fleiri vísa á, at vesi antin eru umvæld ella skulu umvælast. Eisini nevna fleiri, at næmingaráðið skipar fyri hugnakvøldum og jólatiltaki. Hetta vísir, at tað sjáldan eru kjarnuviðurskifti skúlans, ið næmingaráðini hava ávirkan á. Hetta samsvarar eisini við kanningina hjá LUM (2024), sum staðfestir, at:

> Flestu næmingaráð hava ikki regluligar fundir, og samskiftið við leiðslu og lærarar er ógreitt. Næmingar kenna ikki síni rættindi, og fá dømi eru um, at næmingaráð hava fingið ávirkan á avgerðir í skúlanum. (LUM, 2024, s. 6)

Hetta bendir á, at hóast næmingaráðini eru ein formell skipan, so er tann veruliga ávirkanin avmarkað.

## Kjak og niðurstøður

Føroyska kunngerðin frá 2025 er eitt týðandi stig á leiðini at tryggja næmingum rætt til luttøku og ávirkan á skúlalívið. Hon samsvarar við norðurlendsku hugsjónina um skúlan sum ein felagsskap, har næmingar eru aktivir borgarar, ikki bara móttakarar av undirvísing. Samstundis vísir gransking, bæði úr Føroyum og úr øðrum Norðurlondum, at veruleikin í skúlanum ofta er fjarur frá politisku orðingunum. Hetta merkir, at hóast skipanin er til, so er luttøkan hjá næmingum ikki altíð merkt av veruligari ávirkan.

Við støði í Lundy-myndlinum kunnu vit staðfesta, at Føroyar hava tikið stór fet á leiðini móti rúmi og rødd, men at áhoyrari og ávirkan enn eru veikar dimensjónir. Tað vil siga, at næmingar hava møguleika at siga sína meining, men ikki altíð uppliva, at hon fær týdning. Henda tvídrátt millum form og innihald er tað, sum Biesta (2006) kallar „demokratiska paradoxið“. Skúlin kann læra um demokrati, men samstundis læra børnini, at teirra luttøka og teirra meiningar ikki altíð vera hoyrd.

Gransking í øðrum Norðurlondum (Andersson, 2018; Rönnlund, 2014; Tujula, 2023) vísir, at sama mynstur ger seg galdandi har: Næmingaráð eru ofta ráðgevandi heldur enn avgerðartakandi organ, og lærarar standa við stórari ábyrgd at tryggja, at røddirnar fáa meining. Føroysk ungdómsgransking gevur somuleiðis eitt viðkomandi perspektiv á henda spenningin. Gaini (2024) vísir á, at ung í Føroyum ofta mugu samráðast við eina sterka vaksnamannamentan, har vaksin framvegis hava avgerandi vald yvir teimum skipanum, sum eru ætlaðar børnum og ungum. Hetta sæst eisini í arbeiðinum hjá næmingaráðum, har næmingar ofta fáa møguleika at koma til orðanna, men har karmarnir fyri luttøku og avgerðir framvegis verða stýrdir av lærarum og leiðslu. Í hesum ljósinum kann næmingaluttøka verða fatað sum treytað av, hvussu stórt rúm og harvið ávirkan skúlin og leiðslan eru sinnað at lata næmingunum.

Tað ber tó til at síggja glottar í føroyskum høpi: smærri skúlar, nærleiki millum lærarar og næmingar, og vilji at taka næmingarnar við. Hetta eru fortreytir, sum kunnu geva rúm fyri veruligum borgaraskapi. Um hesar fortreytir verða mentar við fakligum stuðli, vegleiðing og skipaðum arbeiðsháttum, kann føroyski skúlin skapa ein veruligan lærandi felagsskap – har næmingar uppliva luttøku, ikki bara sum rætt, men sum ábyrgd og møguleika.

Fyri at næmingaluttøka skal gerast verulig og ikki bert formell, mugu næmingaráð hava greiðar karmar og rúm at virka í. Hetta merkir, at fundirnir mugu verða skipaðir regluliga og hava fasta tíð á tímatalvuni, so arbeiðið ikki verður flutt til fríkorter ella í endanum av skúladegnum, har virkni og týdningurin ofta verður niðurraðfestur.

Tað er eisini avgerandi, at allar avgerðir og tilmæli frá næmingaráðum fáa svar og afturmelding frá leiðsluni. Tá síggja næmingarnir, at teirra íkast ikki bara verður hoyrt, men tikið í álvara og kann hava veruligan týdning. Soleiðis kunnu næmingar uppliva ávirkan og mennast sum virknir borgarar.

Landsráðið fyri næmingaráð eigur at vera ein virkin og lærandi pallur, har næmingar úr øllum landinum kunnu samskifta um royndir, arbeiðshættir og menna felags tilmæli. Hetta styrkir bæði demokratiska fatan og felags borgaraskap millum næmingar.

Eisini má tryggjast, at luttøkan fevnir um allar næmingar. Yngri næmingar, næmingar við serligum tørvi og næmingar við aðrari málsligari- ella mentanarbakgrund skulu hava veruliga atgongd og stuðul til at luttaka. Bert tá kann næmingaráðið endurspegla allan næmingahópin og gerast ein veruligur demokratiskur felagsskapur og leikvøllur.

## Niðurstøða

Hóast áseting hevur verið um næmingaráð í fólkaskúlalógini síðani 1997, hevur føroyska skúlaskipanin fram til nýggju kunngerðina frá 2025 manglað greiðar reglur fyri, hvussu næmingaráð skulu skipast og virka í praksis. Við kunngerðini hevur føroyski fólkaskúlin nú fingið eitt meira skipað og formligt

grundarlag fyri næmingaluttøku og fyri arbeiðinum hjá bæði næmingaráðum og landsráði fyri næmingaráð.

Greinin hevur við støði í Lundy (2007) og Biesta (2006) kannað, hvussu næmingaráð í føroyskum høpi kunnu skiljast sum annaðhvørt demokratisk lærirúm ella symbolsk skipan. Greiningin vísir, at føroyskir næmingar í stóran mun kenna til næmingaráðini, skilja valskipanina og ofta uppliva, at ráðini kunnu hava ítøkiliga ávirkan á skúlalívið. Hetta bendir á, at føroyskir skúlar á fleiri økjum hava megnað at skapa rúm fyri næmingaluttøku og borgaraligari venjing í praksis.

Samstundis vísir bæði føroyska og norðurlendska granskingin, at tað framvegis eru týðandi avbjóðingar. Næmingar uppliva ikki altíð, at teir verða tiknir í álvara, og nógv sakna greiða afturmelding frá leiðslu og lærarum um, hvussu teirra sjónarmið verða brúkt í avgerðartilgongdum. Á henda hátt kann næmingaluttøkan gerast meira symbolsk enn veruliga demokratisk. Tað er sostatt vandi fyri, at næmingaráð verða skipanir, sum lúka formell lógarkrøv, uttan at næmingarnir veruliga uppliva ávirkan og ábyrgd.

Greinin førir tí fram, at demokratisk luttøka ikki kann tryggjast við lóggávu einsamallari. Tað krevur eisini námsfrøðiliga og mentanarliga tilgongd, har lærarar og leiðsla aktivt arbeiða við at skapa gjøgnumskygni, samskifti og felags ábyrgd í skúlanum. Um næmingaráð skulu virka sum demokratisk lærirúm, mugu næmingar ikki bara fáa møguleika at siga sína meining, men eisini uppliva, at teirra rødd hevur týdning og ávirkan á skúlalívið.

Sum føroysk ungdómsgransking eisini hevur víst, er luttøka hjá ungum í Føroyum tætt knýtt at relatiónum, nærleika og samráðing við vaksin (Gaini, 2013; 2024). Tað merkir, at næmingaráð ikki bert eru ein formell demokratisk skipan, men eisini eitt mentanarligt og sosialt rúm, har vald, ábyrgd og borgaraskapur verða samrádd í verki. Í føroyskum høpi sum aðrastaðni verður demokratiskt luttøka sostatt skapað í samspæli millum formellar karmar, sosialar relatiónir og mentanarligar væntanir.

Sæð í ljósinum av Biesta (2006) kann niðurstøðan sostatt verða, at næmingaráð hvørki eru sjálvskrivað demokratisk ella bert symbolsk. Tey verða tað, sum skúlamentan, leiðsla og praksis gera tey til. Tá næmingaráð fáa veruligt rúm, greiðar karmar og álítandi uppfylging, kunnu tey gerast eitt "livandi fólkaræði", har næmingar læra demokrati við at liva tað. Tá hetta ikki hendir, er vandi fyri, at næmingaráð verða ein formell skipan uttan djúpari demokratiskan týdning.

Nýggja kunngerðin frá 2025 gevur Føroyum ein serligan møguleika at styrkja næmingaluttøku sum ein virknan part av skúlalívinum. Avgerandi verður tó, um arbeiðið við næmingaráðum framyvir verður fatað sum meira enn ein umsitingarlig skylda – nevniliga sum ein grundleggjandi partur av skúlanum sum demokratiskur lærufelagsskapur.

## Keldur

Aðalbjarnardóttir, S., & Harðardóttir, E. (2018). *Democratic education and participation in Nordic schools*. Reykjavík: University of Iceland Press.

Andersson, E. (2018). *The school as a public space for democratic experiences: Formal student participation and its political characteristics. Education, Citizenship and Social Justice, 14*(2), 149–164. https://doi.org/10.1177/1746197918776657

Biesta, G. (2006). *Beyond Learning: Democratic Education for a Human Future.* Boulder: Paradigm Publishers.

Gaini, F. (2013). *Lessons of Islands: Place and Identity in the Faroe Islands*. Fróðskapur, Faroe University Press.

Gaini, F. (2024). *Beyond the Shadow of Adults—Youth, Adultism, and Human Rights in the Faroe Islands*. Social Sciences, *13*(2), 98. .https://doi.org/ 10.3390/socsci13020098

Guðjohnsen, R. Þ., & Harðardóttir, E. (2025). *Student Councils and Democratic Participation in the Nordic Region.* Nordisk Velfærdscenter. https://www.diva-portal.org/smash/record.jsf?pid=diva2%3A1964419

Kunngerð nr. 119 frá 02.07.2025 um næmingaráð og landsráð fyri næmingaráð fólkaskúlans. https://logir.fo/Kunngerd/119-fra-02-07-2025-um-naemingarad-og-landsrad-fyri-naemingarad-folkaskulans

Lundy, L. (2007). *'Voice' is not enough: Conceptualising Article 12 of the United Nations Convention on the Rights of the Child. British Educational Research Journal, 33*(6), 927–942.

Lundy, L. (2013). *Children's rights and educational impact: The four-dimensional model revisited. Children & Society, 27*(6), 451–462.

Løgtingslóg nr. 91 frá 11. mai 2024 um fólkaskúlan (Fólkaskúlalógin).

LUM – Barnaumboðsmannin (2024). *Kanning av næmingaráðum í fólkaskúlum, friskúlum og serskúlum.* https://www.lum.fo/kanning-av-naemingaradum-i-folkaskulum-friskulum-og-serskula

Rönnlund, M. (2014). *Justice in and through Education? Students' participation in decision-making. Journal of Social Science Education, 13*(2), 104–113.

Tiusanen, M. (2025). *Oppilaskunnan tavoitteista toteutukseen: Oppilaiden näkemyksiä vaikuttamisesta.* University of Turku.

Tujula, M. (2023). *Aktiiviseksi koulussa ja yhteiskunnassa: Kouludemokratian toteuttaminen peruskoulussa.* Helsinki Studies in Education, 165.